


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í JULI/AUGUST, M.A.:

**6. juli** til móttøku hjá amerikanska sendiharrarnum (amerikanski frælsisdagurin).

**10. juli** jarðarferð hjá Orra Vigfússyni.

**14. juli** til móttøku hjá franska sendiharranum (franski tjóðardagurin – Bastilludagurin) .

**18. juli fundur** við Gunnar K. Guðmundsson, formann í føroy-ska-íslendska handilskamarinum**.**

**16. august** fundur í felags-nevndini (Hoyvíkssáttmálin).

**19. august** verður Mentanar-nátt í Reykjavík. Sendistovan tekur, sum vanligt, lut í hesum tiltaki, við m.a.:

- Opið hús í Sendistovuni við føroyskum mati, tónleiki, listaframsýning, røðum og nógvum øðrum góðum
- Føroyskir tónleikarar í Hørpu

**31. august** Ráðsfundur (Hoyvíssáttmálin)

Frá **24. juli** til **13. august** verður sendistovan stongd vegna summarfrí. Tó er telefonisk og teldupost vakttænasta.

Næsta mánaðarbræv kemur í september.

## ÍSLAND VARÐVEITIR SOMU RATING

S&P (Standard and Poor´s), sum er eitt ratingfelag, eins og Moody´s, hava júst ratað Ísland. Ísland varðveitir skuldarflokkingina "A/A-1" við støðugum útliti. Henda rating er sætta hægsta rating hjá S&P. S&P grundgevur støðuna m.a. við at:

- Ísland fer at halda fram við at vísa sterkan vøkstur,
- vandi er fyri at búskapurin verður ovhitaður, orsakað av stórum lønarhækkingum og stórum vøkstri í húsaprísunum og
- støðuga útlitið ríður millum møguleikan at betra fíggjarpolitisku støðuna og vandan fyri, at búskapurin verður ovhitaður næstu tvey árini

*» Almenna skuldin væntast at lækka úr 42% av BTÚ í endanum av 2016 niður ímóti 30% av BTÚ í 2020. S&P roknar við, at skuldin kann lækkast við enn størri ferð enn roknað er við. Hetta kann t.d. gerast við sølu av bankum, sum landið eigur, og nýta inntøkurnar til at rinda enn meira niður av skuldini.«*

BTÚ fyri hvønn íbúgva í Íslandi var 51.000 $ í 2015, 60.300 $ í 2016 og væntast at verða 70.700 $ í 2017. Her er talan um høgt BTÚ og stóran vøkstur frá ári til árs. Til samanberingar, so var BTÚ fyri hvønn íbúgva í Føroyum 45.700 $ í 2015 (smb. seinastu rating hjá Moody´s) ella um góðar 6.000 $ lægri enn í Íslandi.

## *RÍKISKASSIN STÓRT AVLOP Í 2016*

Roknskaparliga úrslitið fyri 2016 er nú alment og latið Altinginum. Høvuðsúrslitið er eitt avlop uppá 294,6 mia. ISK (~18,4 mia. DKK) í mun til 20 mia. ISK (~1,3 mia. DKK) í 2015.

Orsøkin til stóra avlopið í 2016 er fyrst og fremst tann, at avsettar útreiðslur vórðu førdar aftur við 414,6 mia. ISK (~26 mia. DKK), ið stava frá óbótaførum fíggjarfyritøkum, sum høvdu gjørt íløgur í ognir.

Útreiðslurnar til pensjónsskyldur hjá ríkiskassanum vuksu serliga nógv í 2016 vegna umleggingar.

Avlopið í 2016 gjørdist 14,5% av BTÚ, samanborið við 3,8% í 2015. Um afturførdu skyldurnar ikki vóru roknaðar uppí, so gjørdist hallið í 2016 negativt við 2,7% av BTÚ.
Støðufesti innan tað búskaparliga umhvørvið og ein sterkur vøkstur í BTÚ, hevur styrkt keypiorkuna og hevur styrkt støðuna hjá ríkiskassanum. Einstaklingar, fyritøkur og kommunur hava minkað skuldina síðan fíggjarkreppuna. Tað er gagnligt at brúka búskaparligu framgongdina til at hava avlop í landskassanum og minka um lánsskuldina. Á henda hátt verður búskapurin ikki upphitaður ov mikið og samstundis verður høvið nýtt til at víðka um undirstøðukervið og styrkja um vælferðarskipanina, sigur Benedikt Jóhannesson, fíggjarmálaráðharri.

*Sí meira her (á enskum)*

## BÚSKAPURIN Í ÍSLANDI SKJÓTAST VAKSANDI INNAN OECD




*Mynd 1. Ísland er komið skjótt og væl úr kreppuni. Bláa strikan er real BTÚ (vinstri ási) og* ***reyða*** *strikan er arbeiðsloysið í % (høgri ási).*

Ísland er tað OECD land, ið hevur tann skjótast vaksandi búskapin. Ísland er komið framúrskarandi væl úr fíggjarkreppuni og kemst hetta millum annað av, at ferðavinnan í Íslandi hevur verið í einum sera stórum vøkstri seinastu árini og av skynsamum fíggjarpolitikki og góðum uttanhýsis umstøðum.
Kapital bindingarnar eru tiknar av og skeivleikin í búskapinum er rættaður upp seinastu átta árini. Við tað, at kapital bindingarnar eru tiknar av, er avmarkingin av keypi, sølu og rørslu av innlendis og fremmanda gjaldoyra um landamørk í stóran mun burtur. Húsarhald og fyritøkur verða ikki longur hildnar aftur av reglunum um útlendskt gjaldoyra. Reglurnar innihalda m.a. keyp og sølu av fremmandum gjaldoyra, útlendskar peningaíløgur og flyting av peningaligum vinningi heim. Hesi viðurskiftini hava størstu ávirkanina á borgaran og fyritøkurnar í Íslandi. Hesar reglur vórðu settar í verk í kreppuni í 2008 og hava verið galdandi til mars 2017. Nú, kapital bindingarnar eru tiknar av og aðrar broytingar eru gjørdar í lógini, er tó vandi fyri, at tað verður ójavni á gjaldjavnanum, penga og gjaldoyra kursinum.

Ísland er eitt javnrættindasamfelag  við sterkum fakfeløgum, lítlum ójavnvági og høgum kynsjavnvági. Íslendski búskapurin er lítil og opin og viðbrekin. Eftirspurningurin innanlendis í Íslandi er høgur og lønarvøksturin er stórur og prísirnir á ognum økjast nógv. Fíggjarpolitikkurin hevur verið lagaligur, hóast stóran vøkstur. Trýst er eisini á prísvøkstrinum. Uttanhýsis umstøðurnar eru ein orsøk til, at inflasjónin í Íslandi er lág.




*Mynd 2. Ferðavinnan í Íslandi er vaksin nógv síðani 2010. Árligi vøksturin hjá Íslandi er sera høgur.*

Talið av ferðafólkum, ið árliga koma til Íslands, er meira enn fjórfaldað síðan 2010. Ferðavinnan er nógv tann størsta útflutningsvinnan í Íslandi og hevur havt við sær, at fólk í útflutningsvinnuni vinna nógvan pening og ferðavinnan hevur skapt nógv nýggj størv. Ferðavinnan hevur eisini givið skattainntøkur til tað almenna. Samstundis, sum ferðavinnan hevur havt jaliga ávirkan á búskapin, kemur hon eisini við ymsum avbjóðingum. Ferðavinnan hevur stóra ávirkan á íbúðartrýstið og umhvørvið í teimum býum, har flest ferðafólk vitja. Íslendska stjórnin hevur lagt eina ætlan, saman við vinnuni, at viðlíkahalda umhvørvið, fyri at tryggja umhvørvið samstundis, sum náttúran framhaldandi skal vera tað, ið dregur ferðafólk til Íslands. Í myndini til vinstru sæst árligi vøksturin í ferðafólkastreymurin seinastu 20 árini. Sammett við restina av heiminum, hevur Ísland eina sera stóra árliga øking av ferðafólkum, serliga frá 2010.

Ísland hevur góð lívskor, lágt fátækdømi og er eitt samfelag, sum tekur hond um allar borgarar og hevur eina av heimsins mest burðardyggu pensjónskipanum. Hóast hetta, hava verkføll og lønarhækkingar sett trýst á prísvøksturin og er hetta ein hóttan móti altjóða kappingini, serliga tá framleiðslan í Íslandi hevur verið lág.

Fíggjarstøðan í Íslandi er vorðin munandi betri eftir fíggjarkreppuna. Ísland hevur havt avlop á fíggjarlógini tey seinastu árini og hevur minkað munandi um skuldina hjá ríkiskassanum.

Íslendskir løntakarar hava fingið stórar lønarhækkingar nakrar ferðir tey seinastu 30 árini, vegna spenningar millum arbeiðsfólk, vinnufólk og tað almenna. Lønarhækkingarnar hava í høvuðsheitum verið framdar tá inflasjónin var lág. Í 2015 vóru aftur lønarhækkingar og øll starvsfólk fingu játtað upp til 20% hækking tey næstu trý árini. Lønin í Íslandi er vaksin nógv, samstundis sum tann íslendska krónan er styrkt nógv seinastu tíðina og ger hetta, at kappingarstøðið hjá Íslandi er versnað seinastu árini.




*Mynd 3. Hækkingin í lønum er økt meira enn vøksturin í framleidni seinastu árini.*

*Sí meira her (á enskum)*

## PRÍSSTØÐIÐ Í ÍSLANDI HÆKKAÐ NÓGV, SERLIGA HJÁ FERÐAFÓLKUM

Av tí at krónan er hækkað nógv seinasta árið, er tað vorðið nógv dýrari hjá ferðafólkum at vera í Íslandi. Prísstøðið á matstovum er vorðið 43% dýrari fyri bretar í ár, í mun til í fjør, og bretar skulu gjalda 48% meira fyri at leiga ein bil í ár enn í fjør, orsakað av muninum á bretska pundinum og íslendsku krónuni. Hetta sæst í eini kanning, sum Rannsóknarsetur verslunarinnar (www.RSV.is, ið er ein depil, sum kannar handilsvinnuna, tænstuvinnuna og ferðavinnuna) hevur gjørt fyri Morgunblaðið. Gisting goldin í Evrum er nú 26% dýrari enn í fjør og mat og leskidrykkir eru nærum 21% dýrari í USD í ár, í mun til í fjør. Prísstøðið á matstovum er vorðið 33,7% dýrari í CAD (kanadiskum dollarum) og 34,5% dýrari í JPY (japanskum jennum).

**Breytingar á verðlagi fyrir erlenda ferðamenn á Íslandi frá júní 2016 til júní 2017***

| | Bandaríkjadalur | Pund | Kanadadalur | Jen | Evra |
|---|---|---|---|---|---|
| Matur og drykkur | 20,7% | 34,0% | 25,4% | 26,2% | 21,0% |
| Leigubifreiðar | 33,7% | 48,5% | 39,0% | 39,8% | 34,0% |
| Klipping | 27,5% | 41,5% | 32,5% | 33,3% | 27,8% |
| Veitingahús | 28,6% | 42,8% | 33,7% | 34,5% | 28,9% |
| Gisting | 25,6% | 39,4% | 30,5% | 31,3% | 25,9% |
| Pakkaferðir innanlands | 27,8% | 41,8% | 32,8% | 33,6% | 28,1% |
| Húsgögn og heimilisbúnaður | 15,1% | 27,8% | 19,6% | 20,4% | 15,4% |
| Raftæki | 13,0% | 25,5% | 17,4% | 18,2% | 13,3% |
| Ökutæki | 12,0% | 24,3% | 16,4% | 17,1% | 12,2% |
| Námskeið | 28,4% | 42,5% | 33,4% | 34,2% | 28,7% |

*Miðað er við breytingar á gengi frá júní 2016 til júní 2017. Miðað er við verðlagsmælingu Hagstofunnar í maí hvort ár.
Heimildir: Hagstofa Íslands, Seðlabankinn, Rannsóknasetur verslunarinnar.

*Mynd 4. Prísbroytingar fyri ferðafólk í Íslandi við útvaldum gjaldoyra (USD, GBP, CAD, JPY og EUR) og útvaldum vørubólkum*

Hetta er roknað út frá broytingum í gjaldoyravirðinum frá juni 2016 til juni 2017. Við tí í huga, at prísstøðið hækkar, er kanningin gjørd við fyrivarni, og enn meiri hækking kann vera, enn kanningin vísir á. Tað, at íslendska krónan er hækkað so mikið seinasta árið, kann hava við sær, at ferðamynstrið kann broytast. Árni Sverrir Hafsteinsson, hagfrøðingur hjá RSV sigur, at til dømis kunnu ferðafólk heldur velja at keypa matvøru í handlum, í staðin fyri at fara út á matstovur at eta, og somuleiðis kunnu ferðafólk gevast við at keypa íslendskar servørur, tí tær er vorðnar ov dýrar. Pakkaferðir eru eisini vorðnar dýrari seinastu árini, og um ferðafólkini vilja spara, kann tað verða, at fólk ikki gera brúk av pakkaferðum, sum t.d. tyrlutúrum og hvalatúrum. Broytingin í keypsmynstrinum hjá ferðafólkunum, kann væntast at broytast mest í teimum londum, har gjaldoyrað er nógv lækkað í mun til virðið á íslendska gjaldoyranum.

Prísurin hjá ferðafólkum at koma til Íslands, er ein heilt annar í ár enn í fjør. Prísmunurin er vorðin so stórur, at tað kann minka um áhugan hjá ferðafólki at koma til Íslands. Fólk við lágari inntøku, kunnu gevast at koma vegna høga prísin, tí tey ikki hava ráð. Hetta fer helst ikki at ávirka ferðafólk við høgari inntøku á sama hátt og fara tey helst at ferðast sum áður, sigur Árni Sverrir Hafsteinsson.
Lønarhækkingar seinasta árið, hava havt ávirkan á ymsar vinnugreinar. Av tí at eftirspurningurin av vørum og tænastum er stórur, hækkar prísurin og kann hetta ávirka eftirspurningin eftir vørum og tænastum, ið ferðafólk gera brúk av.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÍSLAND TRIÐ BESTA LANDIÐ Í HEIMINUM, TÁ HUGT VERÐUR EFTIR SAMFELAGSLIGUM FRAMSTIGUM




*Mynd 5. Her sæst, hvat Ísland skorar í kanningini, samanborið við onnur lond.*

Ísland er triðbesta landi í heiminum, saman við Norra, tá hugt verður eftir vísitølunum fyri samfelagslig framstig. Kanningin er grundað á tríggjar tættir, grundleggjandi tørv, grundleggjandi lívsgóðsku og lívsmøguleikar. Hetta vísa niðurstøðurnar í einari kanning av 128 londum og er bygd uppá greining av tølum úr hópin av upplýsingargrunnum í londunum.
Sambært kanningini, er Danmark á fyrsta plássi, Finnland á øðrum plássi og Ísland og Norra á einum deildum triðja plássi. Kanningin vísir, at íslendingar sum heild vísa tolsemi, til dømis viðvíkjandi trúarbólkum og minniluta bólkum, har Ísland er á fyrsta plássi. Mismunur og harðskapur móti minnilutabólkum er ongastaðni so lítil, sum í Íslandi. Samfelagsliga trygdarnetið er sera gott. Ísland er á fimta plássi, tá tað snýr seg um atgongd til upplýsingar. Meira enn 98% av tjóðini brúka alnótina regluliga. Talið av fartelefonrokningum fyri hvørjar 100 íslendingar er 100. Tá tað kemur til umhvørvið, er Ísland á einum 25. plássi av 128 londum. Tað, at Ísland er so langt niðri í umhvørvis bólkinum, kemst helst av stóru økingini av ferðafólkum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## VILJA INNKREVJA FERÐAFÓLKAAVGJALD Í FAXAFLÓAHAVNUM (HAVNIRNAR Í REYKJAVÍKARØKINUM)




*Mynd 6. Havnirnar í Faxaflóahavnum (í Reykjavíkarøkinum) vilja krevja ferðafólkaavgjald frá ferðafólkum við skemtiferðaskipum og teimum, sum ætla av hyggja at hvalum.*

Eitt serstakt ferðafólkaavgjald skal krevjast frá ferðafólkum frá skemtiferðaskipum og fyri ferðafólk, ið fara við bátum at hyggja at hvalum, frá 1. apríl 2019 at rokna. Hetta gjald skal verða 185 ISK (~12 DKK) fyri hvønn, segði Gísli Gíslason, havnastjóri, við Morgunblaðið. Gísli Gíslason sigur, at umleið 250.000 ferðafólk fara árliga at hyggja at hvalum og umleið 140.000 ferðafólk koma við skemtiferðaskipum. Um metingin er røtt, fáa Faxaflóahavnir góðar 72 mió. ISK (~4,5 mió. DKK) um árið av ferðafólkaavgjøldum.
Inntøkurnar frá ferðafólkaavgjøldunum skulu nýtast til at byggja og reka hentleikar til ferðafólk og fyritøkur innan ferðafólkatænastu komandi árini.
Ein nágreinilig kostnaðarætlan yvir bygnaðin er ikki klár enn, men Gísli Gíslason væntar, at kostnaðurin fyri at seta hetta í verk, verður umleið eina milliard ISK (~62,5 mió. DKK), tá alt er íroknað.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## 10 NÝGGIR TROLARAR KOMA TIL ÍSLANDS Í ÁR




*Mynd 7. Roknað verður við, at 10 nýggir trolarar koma til Íslands í ár. Her sæst nýggi trolarin hjá HB Grandi, Engey, sum kom til landið við ársbyrjan.*

Um alt gongst eftir ætlan, koma 9 ella 10 nýggir trolarar til íslendska fiskiflotan í ár, og ætlanin er at byggja enn fleiri bátar. Tveir trolarar eru málaðir og sjósettir í Kina, annar skal til Vestmannaoyggjarnar og hin fer til Hnífsdal í Vestfirðunum. Upprunaliga skuldu bæði skipini verið handað í fjør. HB Grandi hevur longu fingið ein nýggjan trolara í ár, annar er á veg heim og tann triðji er í gerð.
Reiðaríið hevur eisini gjørt avtalu við eina spanska skipasmiðju um at byggja 4 nýggjar frystitrolarar, sum roknast at verða klárir í 2019.
Trý reiðarí á norðurlandinum vænta sær 4 nýggjar trolarar frá turkisku skipasmiðjuni í Cemre. Tveir av teimum eigur Samherji, Fisk Seafood ein og tann fjórða eigur Útgerðarfélag Akureyrar. Tann fimti nýggi trolarin á norðurlandinum varð smíðaður í Turkalandi fyri Ramma hf. og kom hann til Ólafsfjarðar í mai.

Nevnast kann, at Sildavirkið í Neskaupstað hevur ætlanir um at endurnýggja sín flota og ætlar at lata smíða tveir stórar og tveir nakað minni ísfiskatrolarar. Sildavirkið vónar, at byggingin av fyrsta skipinum verður bjóðað út í heyst.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## TOSKAKVOTAN HÆKKAR VIÐ GÓÐUM 11.000 TONSUM

Til komandi fiskiár, hækkar toskakvotan úr 244.000 tonsum upp í 255.172 tons. Talan er um ein vøkstur uppá góð 11.000 tons ella ein øking í prosentum uppá 5,6%. Hetta er eftir tilráðing frá íslendsku Havstovuni (Hafrannsóknarstofnun), eins og áseting av kvotum fyri hini fiskasløgini eisini eru.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## STIG TIKIN TIL TOKSKIPAN Í REYKJAVÍK



Mynd 8. Ætlaðu tokini skulu vera el-rikin.

Íslendsku kommunurnar í høvuðsstaðarøkinum arbeiða saman um eina framtíðar ætlan við eini tokskipan við lættjarnbreytum og snartokum. Kommunurnar hava sent eina umsókn til stjórnina viðvíkjandi stuðli til fígging av verkætlanini.
Høvuðsstaðarøkið er mett at vaksa við 70.000 borgarum tey næstu 25 árini. Talið av ferðafólkum økist eisini støðugt, sum ger, at ferðatíðin verður økt við 65% og ferðslutøppar verða øktir við 80%. Endamálið við nýggja undirstøðukervinum er, at fáa eina betri skipan av almennum fólkaflutningi, og minka um ferðsluna á vegunum.
Verkætlanin er í alt mett at kosta millum 63-70 mia. ISK (~ 4 – 4,4 mia. DKK), men byggingin skal verða framd í stigum. Hvar tokini fara at koyra, verður avgjørt seinni í summar og fyrstu stigini til fyrireikingar verða liðug í 2018.
Tokini verða rikin av ravmagni. Í háferðslutíðini er ætlanin, at tokini koyra við 5-7 minutta millumbilum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÓLI SAMRÓ Á RUNDFERÐ Í ÍSLANDI VIÐ BÓK SÍNI




Mynd 9. Bókin hjá Óla Samró á føroyskum og íslendskum.

Í sambandi við sjómannadagin, 11. juni, hevði Óli Samró umsett bókina hjá sær "Fiskiskapur – fjølbroyttar ásetingar", sum Óli gav út í 2016, til íslendskt við heitinum "Fiskiveiðar – fjölbreyttar áskoranir". Óli var runt í Íslandi um hetta mundið og greiddi frá sínari bók. Eisini vóru Fiskimannafeløg, reiðarafelagið, reiðarar, bankar og aðrir áhugabólkar vitjaðir. Íslendska útgávan og rundferðin eydnaðist sera væl, tí prentaðu eintøkini av bókini kundu verið seld áðrenn Óli kom runt til tey støð, sum hann skuldi vitja. Tí mátti hann skamta tey eintøk, sum hann kundi selja runt á ferðini. Óli læt sera væl at og mátti staðfesta, at rundferðin eydnaðist avbera væl.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook